# Garanti



Okkara vindeygu halda leingi. Vit royna javnan allar smálutir og tryg  gja okkum at hvørt einasta av okkara vindeygum er tað besta tú ført. Vit royna okkara vørur áðrenn tær koma á marknaðin. Umframt vera vørurnar royndar av viðurkendum rannsóknarstovum, eisini fyri regn- og vindtættleika.

GRANT pf. Er góðkendur framleiðari av H-vindeygum (okkara vørunavn er H-Dygd). Okkara vindeygu vera veitt sambært keypilógini, tó við 12-ára garanti.

Hetta skjal snýr seg um H-Dygd vindeygu og hurðar úr timbri, træ/alu og plast.

Garantiið umfatar:

- Døgg ímillum gløs
- Virkisbrek í ásløgum og spengrum
- Fastleika og haldgóðsku í tilfari

Garantiið hevur við sær at vit:

- Skifta rút, um døgg kemur ímillum gløsini
- Skifta ásløg og spengur við virkisbreki
- Skifta vindeygu við nýggj, um brekið ikki kann rættast innanfyri mørkini fyri garati-treytirnar

Garantiið er treytað av at:

- Vøran verður goymd og ísett sambært framleiðarans tilmæli
- Vøran verður nøktandi hildin við líka. Hetta umfatar eisini yvirflatuviðgerð. Vøra, sum er latin uttan yvirflatuviðgerð, eigur at verða viðgjørd beinanveg eftir veiting
- Eftirlit verður gjørt av yvirflatuviðgerðini árliga
- Ásløg, spengur og liðiligir lutir eftirkannast regluliga og smyrjast eftir tørvi

Garantiið fevnir ikki um:

- Arbeiðsútreiðslur við at skifta ella umvæla skaddar vørur
- Útreiðslur til byggipall, krana ella onnur hjálpartól til at rætta skaðar
- Fylgiskaðar ella onnur arbeiði, sum skulu gerast, t.d. málaraarbeiði, tapetsering, o.a., sum krevst vegna garantiarbeiði
- Skaðar vegna fremmandar lutir, sum eru settir á vøruna
- Slit á tetningslistar vegna máling ella smyrjing
- Lás og onnur ásløg, sum ikki fylgdu við vøruni
- Tá vøran er veitt liðug yvirflatuviðgjørd, fevnir garantiið ikki um sjálva yvirflatuviðgerðina